Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Dagstovnar og dagrøkt

Spurningar:

1. Hvussu fremur landsstýrismaðurin yvirskipaða eftirlitið við, at kommunurnar umsita dagstovnar og dagrøktir sambært løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt?
2. Liva dagstovnarnir upp til ásetingina um starvsfólkabýtið í lógini, sum ásetur, at í minsta lagi 2/3 skulu vera námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 hjálparfólkatímar?
3. Hvussu vil landsstýrismaður tryggja, at børn fáa góðar og tryggar umstøður á dagstovnaøkinum?

Viðmerkingar:

Í langa tíð hava trupulleikar verið á dagstovnaøkinum. Starvsfólk, foreldur og enntá børn rópa varskó.

Vit síggja tað javnan í miðlunum. Starvsfólk á dagstovnum kæra sína neyð. Arbeiðsbyrðan er ov tung. Arbeiðsumstøðurnar eru ikki nøktandi. Men ongin lurtar.

Av tí sama leita námsfrøðingar sær í onnur størv, ikki bara innan teirra egna geira, men eisini innan eldraøkið og aðrar vinnur.

Eisini foreldur vísa á sína ómegd. Ferð aftaná ferð hoyra vit um foreldur, sum ikki fáa gerandisdagin til at hanga saman, tí dagstovnar ikki hava umstøður at veita teirra kjarnuuppgávu – at virka fyri uppaling og menning av børnunum sambært fullgóðari námsfrøðiligari stevnu, sum tað stendur í lógini.

Og eisini børnini hava fingið nokk. Herfyri hoyrdu vit í miðlunum um lítlan drong, sum ikki tímdi í barnagarð longur. Barnagarðurin, sum annars sambært endamálinum í omanfyri nevndu lóg, átti at givið honum eitt trygt og mennandi umhvørvi. Men soleiðis er eftir øllum at døma ikki í løtuni.

Á Løgtingi, 17. februar 2023

Liljan Weihe